## Tinglimur svímaði

Fólkatingslimurin Johanne Schmidt-Nielsen úr Eindarlistanum svímaði, júst sum hon helt røðu í gjárkvøldið. Johanne Schmidt-Nielsen er framsøgukvinna hjá Eindarlistanum og var í ferð við sína framsøgurøðu um setanarrøðu forsætisráðharrans, tá hon fekk trupulleikar við at tosa. Tom Behnke úr Konservativa Fólkaflokkinum skilti, hvat bagdi, og hann leyp upp á røðarapallin, loftaði Johanne Schmidt-Nielsen og var við til at bera hana út úr tingsalinum, meðan hinir tinglimirnir forfarnir hugdi at. Johanne Schmidt-Nielsen bleiv flutt á sjúkrahús og fekk tað betur beinanvegin.



## Pólland skrivar undir

Embætismenn hjá polska forsetanum, Lech Kaczynski, siga, at forsetin fer at skriva undir Lissabon-sáttmálan sunnudagin. Polski forsetin er ikki ES-fjeppari, men fyrr í ár segði hann, at hann fór at skriva undir Lissabon-sáttmálan, um sáttmálin fekk undirtøku á fólkaatkvøðuni í Írlandi. Tað fekk hann, og tí fer Lech Kaczynski at skriva undir sunnudagin. Tá hann hevur sett sítt navn á skjalið, er tað bara kekkiski forsetin, Vaclac Klaus, sum er eftir. Men hann hevur sagt, at hann skrivar ikki undir, fyrr enn greiði er fingin á, um Lissabon-sáttmálin er í andsøgn við kekkisku grundlógina. Tað verður nú kunnað.

# kinssøga

*Tavan í Leirvík hevur keypt størstu gulllaksanøgdirnar í ár, eini 11.500 tons. Virkið hevur serliga keypt frá leirvíkstrolarunum, Polarhavi og Stjørnuni og frá Eysturbúgvanum. Gulllaksur skapar nógv virksemi í Leirvík*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*





*Leirvíkstrolararnir, Polarhav og Stjørnan, hava verið óførir á gulllaksaveiði, og árið í ár hevur ivaleyst verið betri enn nakað annað ár. Hini skipini, sum hava verið á gulllaksi í ár, eru Vestmenningur og Fram og Eysturbúgvin og Vesturbúgvin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Nú má ansast eftir



*- Verður gulllaksastovnurin rætt umsitin, soleiðis at tað einans verður fiskað burtur av vektøkingini á hvørjum ári, fer fiskiskapurin at geva eina góða og støðuga veiði í langa tíð framyvir, sigur havlívfrøðingurin, Lise H. Ofstad, sum arbeiðir við verkætlanum fyri Havstovuna*

**Við stóru gulllaksaveiðini, sum verið hevur í ár, er gulllaksurin framvegis ein sólskinssøga, men havlívfrøðingurin, Lise H. Ofstad, heldur, at nú mugu vit ansa okkum, tí veiðan – eftir hvat fiskifrøðin í dag veit at siga um hetta fiskaslag – helst er í yvirkanti**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Árið í ár hevur verið tað besta til gulllaksaveiði. Tey seks skipini, sum hava verið á hesi veiði í tíðarskeiðinum frá apríl til endan av september, hava havt rættiliga góðan fiskiskap.

Enn er ikki endaliga gjørt upp, hvussu stór samlaða veiðan hevur verið, men hugsandi er, at hon helst liggur millum 22.000 og 25.000 tons.

Tað er, eftir hvat Lise H. Ofstad, havlívfrøðingur heldur, í yvirkanti av tí sum kann rópast burðardygt.

- Enn vita vit ikki alt um gulllaksin. Vit vita ikki, hvar hann gýtir, men tað nýtist ikki at vera negativt. Tað kann eisini vera ein fyrimunur.

Lise sigur, at gulllaksur gerst gamal fiskur, helst upp í eini 30 ár, og eftir hvat fiskifrøðin í dag veit at siga, gerst hann helst kynsbúgvin um 7-8 ára ára aldur.

- Vit vita lítið og einki um gýtingina, men líkt er til, at fiskurin ikki bara gýtir um várið, men eisini um heystið.

Hon vísir á, at Magnus Heinson á sínum royndum hevur fingið onkran gýtingarføran gulllaks um várið, men slíkir fiskar eru eisini fingnir um heystið.

### Genetiskar kanningar

Fiskifrøðin úti í heimi metir, at íslendski gulllaksastovnurin er ein stovnur fyri seg, og síðan er føroyski stovnur partur av norðuratlantiska gulllaksastovninum.

Lise sigur, at áðrenn nakað kann sigast við vissu um hetta, er neyðugt at gera genetiskar kanningar.

- Saman við Noregi og Íslandi hava vit tí søkt NORA um fíggjarligan stuðul til genetiskar kanningar av gulllaksinum í royndini at fáa staðfest, hvussu stovnarnir hanga saman – ella eru skildir sundur.

Hon sigur, at Noreg stendur sum verkætlanarleiðari, men londini hava gjørt av at søkja um stuðulin í felag og annars vera saman um royndirnar.

- Enn vita vit ikki, um stuðul verður játtaður, men tað kann koma at hava stóran týdning fyri metingina av gulllaksastovninum, at kunnleikin um fiskaslagið gerst størri, sigur Lise.

### Neyðugt varsemi

Havlívfrøðingurin vísir á, at støðan við royndini er broytt – og økt - síðan hon skrivaði greinina um burðardyggleikan í gulllaksaveiðini fyri einum ári síðan.

- Men hetta var so eitt úrslit av eini trý ára langari verkætlan, sum byrjaði í 2005, leggur hon aftrat.

Lise H. Ofstad vísir á, at um stovnurin økist við 21.000 tonsum í vekt um árið, sum leystliga hevur verið mett, er ein veiðan upp á kanska 22.000-25.000 tons neyvan burðardygg longur.

- Eitt er, at gulllaksaveiðan hevur verið óvanliga góð í ár, men nú mugu vit ansa eftir, soleiðis at royndin ikki verður størri, enn stovnurin upp á longri sikt tolir.

Havlívfrøðingurin sigur, at kunnleikin, sum Føroyar, Ísland og Noregi nú royna at útvega sær við genetiskum kanningum av hesum fiskaslagi, kann koma at fáa týdning fyri metingarnar av stovninum frameftir.